


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í NOVEMBER, M.A.:

**8. nov.** til fráfaringar-móttøku hjá kinverska sendiharranum.

**9. nov.** luttekur Sendistovan í Altjóða døgunum hjá Háskóla Íslands vegna Fróðskaparsetur Føroya (greiða frá útbúgvingar-møguleikunum í Føroyum)

**12. nov.** til Remembrance Day (minningardagur teirra falnu í heimskríggjunum) tiltak hjá enska og týska sendiharranum.

**13. nov.** vitjan av føroyskum senior ferðalagi við 10 luttakararum.

**16. – 17. nov.** taka lut í Sjávarútvegsráðstefnan 2017 (The Seafood Conference Iceland) í Hørpu.

## VALIÐ 28. OKTOBER 2017

Nýggja stjórnin, sum ikki tók við fyrr enn í januar í ár, eftir valið 29. oktober 2016, gjørdist ikki drúgv. Tí longu í september mánaði, slitnaði stjórnin, orsakað av einum máli um uppreisn æru í sambandi við kynsligan ágang móti børnum. Stjórnarsamstarvið vardi bert 8 mánaðir. Tað var flokkurin Björt Framtíð, sum fyrst sleit stjórnarsamstarvið.
Valið varð útskrivað og valdagurin var 28. oktober 2017, t.v.s. bert 364 dagar eftir seinasta val.
Valúrslitið gjørdist hetta (gráu stabbarnir umboða hetta val):




Valluttøkan gjørdist 81,2%, sum er tvey prosentstig hægri enn seinasta val, tá ið hon bert var 79,2%, sum var søguliga lágt.

*» Sum tað sæst á myndini omanfyri, so fekk sitandi samgonga (Sjálfstæðisflokkurin, Viðreisn og Björt framtíð) ein veljaralúsing við tað, at samgongan hevði 32 altingslimir undan valinum, men eftir valið var tingmannatalið tódnað til bert 20 altingslimir. Sostatt misti samgongan 12 altingslimir.«*

Í staðin fyri, komu tveir nýggir flokkar inn í Altingið, nevniliga Miðflokkurin, sum er sprottin úr Framsóknarflokkinum og Flokkur fólksins. Fyri fyrstu ferð eru 8 flokkar valdir inn í Altingið. Í 2013 vóru tað 6 flokkar og í 2016 gjørdust tað 7 flokkar. 24 kvinnur og 39 menn vórðu valdir inn á ting í hesum vali. Talið av kvinnum gjørdist sostatt 38%. Til seinasta val (2016) var talan um 30 kvinnur ella

48%. Av teimum 63 altingslimunum eru 19, sum fyri fyrstu ferð koma á ting. Í fjør var talan um 31 nýggjar altingslimir.

Á myndini niðanfyri sæst, at høgra/mið-høgraflokkarnir hava 39 altingslimir av teimum 63, meðan vinstraflokkarnir hava 24 altingslimir.

**Høgra-/miðhøgraflokkarnir (39)**

Sjálfstæðisflokkurin (16)
Framsóknarflokkurin (8)
Miðflokkurin (7)
Viðreisn (4)
Flokkur fólksins (4)

**Vinstra/miðvinastraflokkarnir (24)**

Vinstru grønu (11)
Samfylkingin (7)
Píratar (6)

Hvørjir flokkar fara at mynda komandi stjórn, er trupult at meta um. Men floksformenninir vóru í formansumfarinum í sjónvarpinum valnáttina opnir fyri øllum samstarvsmøguleikum. Soleiðis var tað ikki seinast, tá ið fleiri flokkar avvístu at samstarva við ávísar flokkar. Um Sjálfstæðisflokkurin (16) og Vinstru grønu (11) funnu saman, so kundi talan verið um eina samgongu við 3 flokkum. Um hetta ikki gerst veruleiki, so verður talan um minst fýra flokka stjórn. Minniluta stjórn er ikki vanlig í Íslandi.
Eftir valdagin hava floksformenninir loddað dýpið, og dagin eftir eru teir longu kallaðir á fund við forsetan í einum sonevndum "forseta umfari", har floksformenninir skulu vísa á, hvønn teir vilja hava at standa fyri, at royna at skipa stjórn.
Seinast tók tað 73 dagar at skipa eina samgongu, og er tað næst longsta tíð, tað nakrantíð hevur tikið. Longsta tíðin tað tók, at skipa samgongu, var í 1987, tá tað tók 77 dagar.

## *STUTT UM POLITISKU FLOKKARNAR Í ÍSLANDI*

Niðanfyri er ein stutt lýsing av teimum flokkum, sum komu í Altingið til valið 28. oktober 2017.

FRAMSÓKNARFLOKKURINN

**Framsóknarflokkurin**: Flokkurin liggur á miðjuni móti høgru, varð stovnaður í 1916 og var og er ein partur av bónda og fiskimanna rørsluni. Vanliga væl dámdur úti á bygd og uttanfyri Reykjavik. Er ES ivandi. Sigurður Ingi Jóhannsson er formaður og er útbúgvin djóralækni.

**Píratar**: Flokkurin er stovnaður í 2012, hevur ongan greiðan vinstra høgra politikk, men gongur inn fyri beinleiðis demokratii soleiðis, at fólkið tekur støðu til stórar avgerðir við fólkaatkvøðum. Vitan skal kunna lutast við øll, er ein grundarhugsjón hjá flokkinum. Einar Brynjólfsson er formaður og er útbúgvin mag. art í søgu og týskum.

Samfylkingin

**Samfylkingin**: Flokkurin liggur á miðjuni og út til vinstru, og varð stovnaður árið 2000. Flokkurin er fyri ES limaskapi og kallar seg eisini feministiskan. Flokkurin er sosial demokratiskur. Logi Már Einarsson er formaður og er útbúgvin arkitektur.

**Sjálfstæðisflokkurinn**: Flokkurin liggur á mið- høgraveinginum, og er ein av teimum elstu flokkunum, stovnaður í 1929. Hann er liberal konservativur,

fíggjarliga liberalur og ímóti ES limaskapi. Savnar vanliga veljarar frá øllum høgra veinginum. Bjarni Benediktsson er formaður og er útbúgvin løgfrøðingur.

**Viðreisn**: Flokkurin varð stovnaður í 2016. Sosialliberalur og reformistiskur, og liggur á høgru miðjuni. Varð stovnaður av ónøgdum fólki úr Sjálfstæðisflokkinum. Fyri ES limaskapi gjøgnum fólkaatkvøðu. Þorgerður Katrín Gunnarsdóttir er formaður og er útbúgvin løgfrøðingur.

**Vinstrihreyfingin – Grænt framboð**: Flokkurin liggur út til vinstru og varð stovnaður í 2000 av fólki, ið vóru ónøgd við skránna hjá Samfylkingini. Hann er friðarsinnaður, javnaðarsinnaður og feministiskur. Flokkurin er ímóti ES limaskapi. Sum navnið vísir, er flokkurin eisini umhvørvissinnaður. Katrín Jakobsdóttir er forkvinna og er útbúgvin í íslendskum og íslendskum bókmentum.

**Miðflokkurin**: Flokkurin liggur í miðjuni móti høgru, og varð stovnaður tann 15. oktober 2017. Flokkurin vil fegin gera handilsavtalur við aðrar tjóðir og vera virkin í altjóða felagsskapum, t.d. NATO og ST. Miðflokkurin er ímóti ES limskapi. Sigmundur Davíð Gunnlaugsson er formaður og hevur hægri útbúgving innan búskap og samfelagsfrøði.

**Flokkur Fólksins**: Flokkurin varð stovnaður í 2016. Flokkurin er fyri NATO felagsskapinum og EBS avtaluni, men er ímóti ES limaskapi. Flokkur Fólksins, vil endurskoða Schengenavtaluna og herða krøvini yvir landamørkini millum londini við passeftirliti. Inga Sæland er formaður og útbúgvin í BA í løgfrøði og samfelagsfrøði.

## ARCTIC CIRCLE 13. – 15. OKTOBER 2017 Í HØRPU

Í døgunum 13. -15. oktober varð skipað fyri "Arctic Circle" ráðstevnu í Íslandi. Endamálið við ráðstevnuni er at varpa ljós á Arktiska umhvørvið og styrkja altjóða samstarvið í økinum. Arktis er vorðið ein miðdepil í heimspolitikki í sambandi við veðurlagsbroytingar, ið fara fram í arktiska økinum. Hóast veðurlagsbroytingar, eru frambrot gjørd á økinum millum tjóðir. Serliga er tað nýggja veðurlagsavtalan (París-avtalan), ið varð undirskrivað í 2015, har 195 lond tóku undir við uppskotinum um at minka um $CO_2$ útlátið. Stóra undirtøkan er ein týðandi partur fyri at minka neiligu ávirkanina á veðurlagið, men eisini fyri at menna altjóða samstarv millum tjóðir.




*Mynd 1. Ólafur Ragnar Grímsson, fyrrv. forseti og formaður fyri ArcticCircle.org saman við Nicola Sturgeon, First Minister í Skotlandi.*

Ráðstevnan varð hildin í Hørpu í Reykjavík. Ráðharrar, vísindafólk, embætisfólk, stjórnarleiðarar, handilsfólk og lesandi luttóku í stevnuni. Luttakarar, umleið 2.000 í tali frá meira enn 50 londum og fleiri enn 600 røðarar vóru frá nógvum ymiskum felagsskapum úr t.d. Kina, Suður Korea, Íslandi, Russlandi, USA og ST. Ráðstevnan er størsta netverkið av altjóða felagsskapum, ið røða um framtíðina hjá Arktis. Møguleiki var hjá fundarfólkinum at spyrja spurningar, og nógvir av hesum snúðu seg um EU, Brexit, varandi orku og vísind.

Í ár var tað stjórnarakvinnan Nicola Sturgeon úr Skotlandi, sum helt røðu við heitinum "Skotland and the high North". Fyri at minka um veðurlagsbroytingarnar, hevði Skotland gjørt stórar íløgur í varandi orkukeldur, t.d. vindmyllu lonir. Aftaná røðuna, var panel kjak millum Nicola Sturgeon og Ólafur Ragnar Grímsson, fyrrverandi forseta í Íslandi. Kjakið snúði seg um arktisk viðurskifti og

fundarluttakarar fingu møguleika at seta spurningar. Nógvir snúðu seg um EU, varandi orku, Brexit og vísind.

## *ÍSLENDINGAR KLÁRIR TIL HM*



*Mynd 2. Íslendska manslandsliðið hevur kvalifiserað seg til HM endaspælið í 2018, sum minsta tjóð nakrantíð.*

Ísland verður minsta tjóðin nakrantíð, ið luttekur í HM í Russlandi komandi ár. Undan hetta var tað Trinidad og Tobago, sum var minsta landið, ið tók lut í HM í 2006, við einum fólkatali uppá 1,37 mió.

Orsøkin til at íslendingar klára seg so væl er, at fótbólturin er uppraðfestur sum ítróttargrein í Ísland, serliga tey seinastu 17 árini. Sum liður í hesum arbeiði, eru fleiri innandura fótbóltshallir bygdar síðan 2000 soleiðis, at leikarar kundu venja innandura alt árið og menna serstakliga sínar teknisku førleikar. Harumframt eru krøv um at venjarar skulu hava útbúgving, og hevur hetta verið við til at hækka støðið á íslendska fótbóltinum. Innandura hallirnar eru fíggjaðar við stuðli frá kommununum (upp til eini 80% av kostnaðinum yvir 3 ár) og av íslendsku fótbóltsfeløgunum. Í 2011 gjørdist Lars Lagerbäck íslendskur landsliðsvenjari. Við honum fekk íslendska landsliðið veruliga struktur og organisering í sínum spæli, sum eftirmaður hansara, Heimir Hallgrímsson, byggir víðari upp á.

Broytingarnar innan útbúgving, innandura hallir og øktu krøvini til venjararnar, hava verið við til at ment fótbóltsspælið, og úrslitið sæst, fyrst við kvalifisering til EM í 2016 og nú til HM í 2018, har Ísland endaði ovast í bólkaspælinum. Hetta er eitt sera flott avrik fyri eina so lítla tjóð, sum einans hevur eitt íbúgvaratal uppá 340.000. Íslendska kvinnulandsliðið hevur eisini staðið seg væl og ger alsamt størri og størri framstig.

## FÍGGJARMÁLARÁÐHARRIN, BENEDIKT JÓHANNESSON, ER FARIN FRÁ SUM FORMAÐUR FYRI VIÐREISN



*Mynd 3. Benedikt Jóhannesson noyddist frá sum formaður fyri Viðreisn. Þorgerður Katrín Gunnarsdóttir er vorðin nýggjur formaður.*

Benedikt Jóhannesson, sum gjørdist fyrsti formaður í nýggja flokkinum Viðreisn, ið stillaði upp til valið fyri fyrstu ferð í 2016, er nú farin frá. Nýggjur formaður er Þorgerður Katrín Gunnarsdóttir, sum er fiski- og landbúnaðarmálaráðharri. Veljarakanningar hava, síðan val varð útskrivað, víst sera lítla undirtøku fyri Viðreisn. Eina tíð lógu tær væl undir tinggáttini, sum er 5%. Til Altingsvalið í fjør, fekk flokkurin 10,5% av atkvøðunum og 7 tinglimir valdar. Seinastu veljarakanningarnar hava givið flokkinum góð 5%. Til valið gjørdist úrslitið soleiðis, at flokkurin fekk 6,7% ella 4 altingslimir. Benedikt Jóhannesson varð ikki afturvaldur.

## ÍSLENDINGAR ERU FRAMVEGIS ÍMÓTI ES LIMASKAPI



*Mynd 4. Íslendingar taka framvegis ikki undir við ES limaskapi.*

Flestu íslendingar eru ímóti ES limaskapi, sambært kanning, sum Gallup hevur gjørt. Hon vísir, at 59,8% eru ímóti at gerast limir í ES, meðan 40,2% sóu tað gjarna henda. Soleiðis hevur støðan meira ella minni verið síðan hesar kanningar hava verið gjørdar, síðan 2009 ella seinastu 8 árini.

Kanningin vísti eisini, at meirilutin av íslendingum taka ikki undir við nýggjum samráðingum við ES og at taka evruna sum gjaldoyra í staðin fyri íslendsku krónuna. Íslendska krónan hevur verið fyri atfinningum í seinastuni tí virðið av henni er økt so nógv.

Tey, sum eru fyri ES limaskapi, hava ofta ført fram, at søkja um ES limaskap er bert fyri at síggja, hvat tað er, Brússel kann bjóða. Kanningar hava fyri stuttum víst, at fólk hava verið meira jalig fyri at kanna, hvat ES kann bjóða, enn fyri limaskapi.
Nýggja kanningin vísir, at 55,5% eru ímóti at taka upp samráðingar um limaskap, meðan 44,5% eru fyri. Tá tað kemur til at taka evruna sum gjaldoyra, uttan at verða



*Mynd 5. Logi Már Einarsson er formaður í Samfylkingini (Javnaðarflokkinum).*

limaland, hóast ES fleirir ferðir hevur avvíst hesum, so hevur tað kortini verið frammi í íslendska kjakinum, og tá hevur mótstøðan kortini verið eitt sindur minni, nevniliga 52,3% og undirtøkan tað størri, við tað, at 47,3% eru fyri.
Táverandi stjórnin søkti um ES limaskap í juli 2009, í sambandi við fíggjarkreppuna, sum rakti landið. Tá nýggj stjórn tók við í 2013, steðgaði hon samráðingunum og boðaði ES frá í 2015, at Ísland ikki longur var umsøkjari til ES limaskap.

Nú hevur formaðurin í Samfylkingini (Javnaðarflokkurin) tikið táttin uppaftur í sambandi við valið 28. oktober 2017. Logi Már Einarsson heldur tað vera hóskandi at gera av, um vit skulu samráðast við ES, sum kundi verið gjørt við einari fólkaatkvøðu í sambandi við kommunuvalið, ið verður næsta vár. Logi Már Einarsson heldur hetta vera eitt týðandi mál, tá tað kemur til at skipa stjórn eftir valið. Men hann vil tó ikki seta hetta sum eina treyt fyri stjórnarsamstarvi.

## INNTØKURNAR Í FISKIVINNUNI MINKAÐU VIÐ 25 MIA. ISK Í 2016




*Mynd 6. Marknaðirnir fyri íslendska fiskaútflutningin í 2016.*

Inntøkurnar í fiskivinnuni minkaðu við 25 mia. ISK (~1,5 mia. DKK) í 2016 ella við 9%. Roknað verður við, at úrslitið í vinnuni framhaldandi versnar í hesum árinum. Hetta vísir ein kanning, sum Deloitte´s hevur gjørt av fiskivinnuni, eftir umbøn frá Fiskimálaráðnum.
Lønsemi hevur verið betri í størri fyritøkunum, sum hava evnað betur at minka um kostnaðirnar í mun til lækkingina í inntøkunum. Tapið er lutvíst vigað upp ímóti lækkingum í kostnaðum, og skiftisavlopið (EBITDA) er minkað við 15 mia. ISK (~900 mió. DKK) ella við 22%.

*Styrkta krónan er ikki bert negativ.*
Prísirnir á útgerð o.ø. hava lækkað nógv í íslendskum krónum, samstundis sum lønirnar eru munandi øktar. Sjálvt um styrkta krónan hevði eina negativa ávirkan á inntøkurnar í vinnuni, so er útgerð sum t.d. olja, eykalutir, fiskireiðskapur og pakkitilfar vorðin ódýrari. Lækkingin í oljuprísunum hevði eina positiva ávirkan raksturin í fjør, men roknað verður við, at prísurin fer at hækkað aftur í ár.
Frágreiðingin vísir, at hevði veiðan, sum ikki varð veidd, orsakað av verkfallinum í endanum av 2016 og byrjanini av 2017, verið veidd, so hevði úrslitið verið eitt lítið sindur betri.




*Mynd 7. Samlaða skuldin í fiskivinnuni var 56% í 2016 og ognarparturin var 44%. Í 2015 vóru hesi tøl á.v.v. 61% og 39%.*

Fram kemur í frágreiðingini, at samlaða skuldin er lækkað og eginognin er økt. Minkaða skuldin skyldast fyri ein part styrktu íslendsku krónuna, sum hevur havt við sær, at útlendska skuldin er lækkað.

*Sí meira her (samandráttur frá frágreiðingini hjá Deloitte´s – á íslendskum)*


**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook